# Kjartan Ólavssons kvæði
# (Kjartans tættir)

Fyrsti táttur.

Ríða út av Herðarholt
reystar kempur tvær;
fyrstur reið Bolli Tollaksson,
tá íð Kjartan var ikki har.

*Leggið nýjar árar út,*
*tað flýtur ein snekkja*
*fyri hertugans garða,*
*hon er sær av almvið og eikin hin harða,*
*leggið nýjar árar út.*

2. Ríða út av Herðarholti
reystar kempur báðar,
fyrstur reið Bolli Tollaksson,
tá íð Kjartan var ikki hjá.

3. Kjartan legði at Leygará,
mongum tað væl tótti,
snarliga runnu ástir saman
við Guðrun Ósvivs dóttur.

4. Kjartan gongur for faðir sín
leitar við hann ráð:
“Vøn er Guðrun Ósvivsdóttir
eg vil ta frúnna fá."

5. Sømir tað øllum høviskum køllum
læra bæði spekt og sinni
"Líkari var tær mín sæli son,
tín veldiga harra at finna."

6. Svaraði Kjartan Ólavsson
av so góðum treysti:
"Finna skal eg mín veldiga harra
á hesum sama heysti."

7. Kjartan gongur við Guðrun at tala,
tað mátti eingin hoyra,
segði frúnni ætlan sín,
hon rodnaði sum ein droyri.

8. Leggur hann hendur um frúnnar háls,
mælir við hana so blíðum:
"Ísland skal eg á sumri hava,
væl máttú mín bíða.

9. Lat tær góðan hugin siga,
aftur man eg koma,
elska tær ikki annan mann,
ei heldur eg mær konu.

10. Lat tær góðan hugin siga,
aftur komi eg við lív,
elska tær ikki annan mann,
ei heldur eg mær vív.“

11. Tað var Guðrun Ósvivsdóttir,
íð reyðargull bar á hond,
fylgir hon Kjartan Ólavssyni
niður á sjóvarstrond.

12. So letur Kjartan Ólavsson
síni skipini búgva,
allar letur hann streingirnar
av reyðargulli snúgva.

13. Vindur hann upp síni silkisegl,
gull við ráðum brann,
strikar ei á bunka niður
fyrr enn við Noregis land.

14. Strikar ei á bunka niður
fyrr enn á Noregis vág,
har lá Grímur innan fyri,
spælir í brynju blá.

15. Fyrst stígur Kjartan Ólavsson
sínum fótum á land,
so hann Bolli Tollaksson
undir hans høgru hand.

16. "Hoyr tú, Bolli Tollaksson,
eg geri tað ei at loyna;
gakk á sund við griman mann,
har skaltú teg royna."

17. Svaraði tá Bolli Tollaksson,
hann lítur á henda mann:
"Flestalt er hann í gævu treystur,
eg royni ei sund við hann."

18. "Far tú teg til Íslands aftur,
heilsa fólki heim,
eg skal mær á sundið út
at fremja lítlan gleim.

19. Tú heilsa Guðrun Ósvivsdóttur
av so góðum treysti:
Ísland skal eg á sumri hava,
áðrenn tað tekur at heysta."

20. Bolli vindur upp síni segl
út í havið setti;
Kjartan legðist á sundið út
at fremja leikir eftir.

21. Bolli vindur upp síni segl
bæði gul og blá,
strikar ei á bunka niður
fyrr enn á Íslands vág.

22. Kastar hann sínum akkerum
á so hvítan sand,
fyrstur steig Bolli Tollaksson
sínum fótum á land.

23. Fyrstur steig Bolli Tollaksson
sínum fótum á land;
tá var hon Guðrun Ósvivsdóttir
riðin niður til strand.

24. Tá var Guðrun Ósvivsdóttir
riðin niður til strand:
"Hvar er Kjartan Ólavsson,
hví kemur hann ikki á land?"

25. "Tú tarft ei Guðrun Ósvivsdóttir
eftir honum at fregna.
Kjartan er í Noregi
so glaður við kongins tegnar.

26. Kjartan er í Noregi,
fáir finnast slíkir;
hann hevur fest eina norska frú,
hon er ikki tygara líki."

27. Guðrun snúðist Bolla frá,
var reið og ikki góð:
vont er slíkum rakkum at trúgva,
tár á kinnum stóð.
\- - - - -
28. Bolli legði at Leygará,
mongum illa tótti,
snarliga runnu ástir saman
við Guðrun Ósvivsdóttur.

29. Tað var Bolli Tollaksson,
tók sær frú at festa,
snarliga læt til brúdleyps bjóða,
læt ikki leingi fresta.

30. Øllum letur Bolli Tollaksson
í sítt brúðleyp bjóða,
uttan Ólavi Kjartans faðir,
íð væl kann randir rjóða.

31. Drukkið var teirra brúdleypið,
kátt var teirra lív,
gingu so bæði í eina song
Bolli og hans vív.

Annar táttur.
32. Drukkið var teirra brúdleypið
mangur fór glaður av;
eg kvøði um Kjartan Ólavsson,
í Noregi hann var.

33. Spæla teir á sundinum,
báðir reystir seggir;
Kjartan kennir møði á sær,
biður at landi leggja.

34. Kjartan læt at landi leggja
sóu tað konur og menn,
grimur maður á sundi spælir
í hvørjari veglund enn.
\- - - - -
35. Grímur gár fyri Ólav kong,
strýkur sær um enni:
"Heitstórir eru Íslendingar,
vilja oss innibrenna."

36. Kjartan gongur fyri Ólav kong
svør á sína trúgv nú:
"Allir viljum vær Íslendingar
taka við kristnari trú."

37. Mælti tað Kjartan Ólavsson,
hann slær tað í ein gleim:
"Allir kristnast vær Íslendingar,
uttan Fróðar ein."

38. Tað var Torkil erkibisp
heldur á gyltum horni,
allar kristnaði hann Íslendingar
á einum summars morni.

39. "Eg kristni teg, Kjartan Ólavsson,
væl í góðan tíma,
tak við kristnari trúgv av gudi,
eg gevi tær systur mína."

40. Svaraði Kjartan Ólavsson,
konginum illa tótti:
“Eg taki ikki tygara systur,
tað frættir ei Ósvivs dóttir.

41. Svaraði Ingibjørg kongsins systir,
talar eitt orð for sær:
"Viltú Kjartan Ólavsson,
skiljast nú frá mær?"

42. Hon tók upp úr mjøðdrekkju
Kjartani mentir gav:
sylgjan sett við gimsteinum,
gripur av gulli var.

43. Hon gav honum tað góða svørð
við gyltar slíðrar at binda,
hann var aldri í víggi sárur,
íð bar tann brand við lendar.

44. Tað var Ingibjørg, kongins systir
íð gull bar sær á hond,
fylgdi hon Kjartani Ólavssyni
niður til sævarstrond.

45. Har mundi hvørt frá øðrum skiljast,
báðum illa tótti:
"Kjartan, eg fylgi ei longur tær,
tað frættir ei Ósvivsdóttir."

46. Sig tú tíni grannkonu,
tú kemur til Íslands heim:
hon, teg elskaði í Noregi,
var ikki av trælagrein.

47. Heilsa tíni grannkonu,
tú kemur til Íslands aftur:
tær beyðst ástir í Noregi,
ikki av trælaættum."
\- - - - -
48. Kjartan vindur upp síni segl
bæði gul og blá,
strikar ei á bunka niður
fyrr enn við Íslands vág.

49. Skrikar ei á bunka niður
fyrr enn við Íslands vág;
har lá Kálvur innan fyri,
vindur upp segl í rá.

50. Kasta sínum akkerum
á so hvítan sand,
fyrstur steig Kjartan Ólavsson
sínum fótum á land.

51. Fyrstur steig Kjartan Ólavsson
sínum fótum á land,
tá var Guðrun Ósvivsdóttir
riður niður til strand.

52. Har komu frúur og stoltsmoyar
at keypa skrúð og lín,
har kom Tóra Kjartans systir
og fagnaði bróður sín.

53. Revna situr undir faldinum,
alt sømir henni væl;
Kjartan kom frá strondum niðan,
snart var teim til tal.

54. Revna situr undir faldinum,
væl sømir henni klæði:
"Mentarlín og høvuðgull,
tey vil eg hava bæði."

55. Svaraði Kálvur, hennar bróðir,
kundi væl spekt og æru:
"Mentarlín og høvuðgull
tað sømir teg ei at bera."

56. Hann gav henni mentarlín
høvuðgullini tvey;
mangur fær, tað øðrum er ætlað,
eingin tað, øðrum er eyðið.

57. Hann gav henni stakkin
høvuðgullini bæði;
mangur fær, hvat øðrum er ætlað,
eingin tað, íð øðrum er lagað.

58. Hann gav henni gull og fæ
so tað silvuri brenda;
Guðrunu var ikki hjartað lætt,
tá íð hon sá skeinkin henda.
\- - - - -
59. Kjartan gongur for faðir sín,
leitar við hann ráð:
"Vøn er Revna, systir Kálvs,
eg vil ta moynna fá."

60. Tað var Kjartan Ólavsson,
hann tók sær frú at festa;
snarliga læt til brúdleyps bjóða,
ei var longur at fresta.

61. Teir drekka bæði úti og inni,
gott skal slíkum gegna,
Kjartan saknar úr máldrykkju
svørð við kongins tegna.

62. Tórolvs menn hans góða svørð
stjólu úr gyltum skeiðum,
stungu aftur í lodna slíðra
brandin tann hin deiga.

63. Kjartan kemur inn árla morgun,
mist hevði brandin sín:
"Eg havi stuldur og rán at lýsa,
horvin er mækin mín."

64. Teir leita bæði úti og inni
hvør til sama verka,
teir fingu ein mann at leita har,
teir kalla hann Ólav sterka.

65. Teir leita bæði úti og inni
hvør í sínar vráir,
burtur vóru Tórolvs børn
og bitlusynir báðir.
\- - - - -
66. Kjartan kemur inn árla morgun,
lítst hann um so víða:
"Eg havi so mikil ørindi
burt á skóg at ríða."

67. Kjartan leyp á vøllin fram
bæði við ilsku og vreiði,
hann bað saðla horsið tá,
hann burtur á skógin reið.

68. "Tú ver væl um teg, Kjartan mín,"
Knútur mælir av sonnum,
"teir hava á tær illan hug,
tú statt for Leygamonnum."

69. Teir skulu fáa so tungligt gjald,
og hvør skal annann svíkja,
fyrri skal eg láta lív,
enn burtur av veginum víkja.
\- - - - -

70. Guðrun gongur for Bolla inn
fellur for honum í knæ:
"Unni eg Kjartani væl við tí,
nú hevur tú skommir tvær."

71. Guðrun gongur for Bolla inn,
fellur honum til kníggja:
"Bolli, eg verði tær ikki tekk,
so leingi eg Kjartan síggi."

72. Sára græt Guðrun Ósvivsdóttir
av so tungum stríði:
"Tú skalt ongan søtan sova,
meðan Kjartan er á lívi."

73. Bolli leyp á vøllin fram
bæði av ilsku og vreiði,
hann bað saðla sær horsið tá,
hann burt á skógin reið.

74. Kjartan vá fimtan brynjumenn,
rennur í randir sveiti:
"Skjótt er einum av at máa,
heljarmat at veita."

75. Tað var Kjartan Ólavsson,
tað fann hann til ráð:
stígur nú á tað deiga svørð
við hvønu mann, hann vá.

76. Aftur vá hann aðrar fimtan,
rennur í randir sveiti:
"Hví stendur tú, Bolli frændi,
vil ongum dugnað veita?"

77. Aftur vá hann triðja fimtan,
rennur í randir sveiti:
"Hví stendur tú, Bolli frændi,
vil hvørgum dugnað veita?"

78. Bolli leyp á vøllin fram,
tað var dreingja ferð,
hann stakk Kjartan Ólavsson
ímillum buls og herða.

79. Mælti tað Kjartan Ólavsson,
tá íð hann fell í knæ:
"Hettar hevur tú, Bolli frændi,
leingi ætlað mær."

80. Kjartan liggur á grønum vølli,
sær seg um so víða:
"Einki skuluð tit Bolla gera,
meðan hann er á lívi."

81. Bolli stendur á grønum vølli,
lítur seg um so víða:
"Eg má ikki gera so ónt,
at tað má mær jú líða."

82. Tá var grátur í Herðarholt
bæði av konum og kvendum,
Tórolvs børn og bitlusynir
niður til strandar rendu.

83. Tórhals børn og bitlusynir
niður til strandar rendu;
bitlusynir skútu fingu
og út av Hvamsfjørð vendu.

84. Tað var Ólavur faðir hans,
læt sær byggja borg,
síðan livdi hann ævi sína
alla út við sorg.

Uppskriftin er frá Schrøter. Hammershaimb hevur hana í Færøiske Kvæder II (1855), og J. Patursson hevur hana í Gyltu bók. Báðir hava snøggað eitt sindur til. Her er stavingin eitt lítið sindur broytt. jd.